Navn á tí sum leiðir samrøðuna:_______________________________________________

Luttakarar:________________________________________________________________ Skúli:____________________________________

## Um næmingin

Navn:__________________________________________________ Føðingardagur:____________________________________________

Bústaður:_______________________________________________ Foreldur/avvarðandi:_______________________________________

Telefon:_______________________________________________ Teldupostur:_______________________________________________

## Bakstøði

Hvaðan kemur næmingurin?

Hvat hevur serligan týdning fyri, at næmingurin kennir seg tryggan í skúlanum og sum heild?

Hvussu er netverkið hjá familjuni í Føroyum?

Útbúgvingar- og arbeiðsstøðan hjá foreldrunum/avvarðandi?

Hvørji sereyðkenni mynda næmingin (áhugamál, persónligir eginleikar, møgulig frítíðartiboð og/ella ítriv)?

Møguliga spyrja, hvat tey vita um Føroyar?

## Málstøða

Hvussu er næmingurin fyri málsliga við serligum atliti at móðurmálinum?

Dugir næmingurin onnur mál?

Dugir næmingurin at skriva á móðurmálinum og/ella á øðrum málum?

Hvat mál verður tosað heima?

Hvussu verður málsliga menningin stuðlað heima?

Nakað at leggja afturat?

## Heilsuviðurskifti

Tann, sum førir samrøðuna, skal upplýsa um heilsurøktarfrøðingin á skúlanum, skúlatannlæknaskipanina,

kommunulæknaskipanina og rætt til viðgerð og vegleiðing frá Sernámi.

Er nakað viðvíkjandi heilsuni hjá næminginum, sum skúlin skal taka atlit at?

Annað viðkomandi í sambandi við heildarheilsuna?

## Skúlaviðurskifti

Hevur næmingurin gingið í skúla í heimlandinum (hvar, hvussu leingi o.a.)?

Var nøkur lærugrein, sum næminginum dámdi serliga væl?

Hvussu vóru fríkorterini?

Hvussu kláraði næmingurin seg í skúlanum sum heild?

Var nakað í skúlanum, sum var serliga avbjóðandi fyri næmingin?

## Samrøða við familjuna uttan at næmingurin er við

Hvørji viðurskifti gera næmingin tryggan?

Eru serlig viðurskifti, sum hava týdning fyri, at skúlin kann møta næminginum og skilja hann/hana á besta hátt?Umrøða viðurskifti, sum familjan hevur upplivað í sambandi við at flyta til Føroyar, og upplivingina hjá næminginum av hesum?

Familjustøðan sum heild (hvør er komin við til Føroya, og hvør er eftir í heimlandinum)?



Undirvísingarstýrið NÁM

Um næmingin: ______________________________________________

______________________________________________

Um næmingin: ______________________________________________

Bakstøði: ______________________________________________

______________________________________________

Bakstøði: ______________________________________________

______________________________________________

Málstøða: ______________________________________________

______________________________________________

Málstøða: ______________________________________________

______________________________________________

Heilsuviðurskifti: ______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

Skúlaviðurskifti: ______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

Samrøða við foreldrini/avvarðandi uttan næmingin: ______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

Samanumtøka: ______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

# Leiðbeining til móttøkusamrøðu

**Luttakarar**

- Umboð fyri førleikastovuna – førir samrøðuna
- Flokslærari – skrivari og greiðir frá, hví tað er umráðandi at skriva niður
- Næmingur
- Foreldur/avvarðandi

## Áðrenn samrøðuna

- Kunna teg um skjøl um næmingin (t.d. innskrivingarskjalið til skúlan).
- Um neyðugt er fyri tulki til samrøðuna er møguleiki at venda sær til Útlendingastovuna at fáa upplýsingar um møguligan tulk. Send tulkinum spurningarnar áðrenn samrøðuna
- Set teg í samband við næmingin, foreldur/avvarðandi og kunna tey um samrøðuna (endamál, tíð (mesta lagi 45 min.) og stað).
- Ger eitt hugnaligt høli klárt. Gjarna við vindeyga. Bjóða te, vatn, kaffi og okkurt lætt til matna (frukt, keks).

## Samrøðan

- Byrja við at bjóða næminginum og foreldrunum/avvarðandi vælkomnum og greið eitt sindur frá endamálinum við samrøðuni. Presentera tykkum og greið frá tykkara funktiónum. Sig t.d. við næmingin: Eg eri lærari í førleikastovuni og/ella flokslærarin hjá tær, og eg vil fegin koma at kenna teg, og tí vilja vit tosa eitt sindur við teg.
- Sig við næmingin, at tað ikki er krav, at hann/hon svarar spurningunum, og at hon/hann eisini er vælkomin at seta spurningar.
- Spyr næmingin og foreldur/avvarðandi, um tey sita væl, og at tey mugu siga frá, um tørvur er á steðgi, frískari luft, at sleppa á vesi, o.s.fr.
- Upplýs næminginum og foreldurunum/avvarðandi, at í Føroyum hava vit samtykt at arbeiða undir barnarættindasáttmálanum hjá ST, sum m.a. tryggjar rættin hjá børnum, og at tú altíð kann siga einum vaksnum frá, um tær tørvar hjálp. Skúlaverkið í Føroyum tryggjar, at øll hava rætt til undirvísing, og at vit her eru nógv, sum vilja hjálpa teimum.
- Samrøðan fevnir um seks evni: bakstøði, málstøðu, heilsuviðurskifti, skúlaviðurskifti, samrøðu við foreldur/avvarðandi uttan næmingin og samanumtøku.
- Skriva tað niður, sum næmingurin svarar, og t.d. eisini, hvussu hann/hon reagerar upp á spurningin (Blað 2).
- Um tað er torført hjá næminginum at byrja við at fortelja um seg sjálva/n, kanst tú byrja við at siga okkurt um teg sjálva/n ella skúlan.
- Til samrøðuna, har næmingurin ikki skal luttaka, skal avtala verða gjørd frammanundan um, hvør tekur sær av næminginum hesa løtuna.

## Eftir samrøðuna

- Fyri at næmingurin kann fara frá samrøðuni við eini góðari kenslu, er umráðandi at geva honum/henni jaliga afturboðan.
- Útflýggja visitkort til foreldur/avvarðandi, har navn og telefonnummar hjá flokslæraranum og skúlanum eru á.
- Útfylta blaðið (Blað 1 og 2) skal latast leiðslu skúlans at skjalfesta í næmingamappuni.
- Við støði í samrøðuni kunnar flokslærarin hinar lærararnar um tað, sum er viðkomandi.